# Bilar

Nr. 75 • mikudagur • 19. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo




*Roadjet er ein stórur hatcback við 5-hurðum og rúmligur sum ein limousine*

# Audi Roadjet Concept

**Á bilaframsýningini North American International Auto Show varð konseptbilurin Audi Roadjet Concept avdúkaður. Bilurin er ein kombintión av nýggjasta Audi-designinum og sera framkomnari tøkni**


**BILAR**

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Audi Roadjet við einfaldum designi og tí stóra eyðkenda Audi-kølaragittarinum*

Audi Roadjet hevur nógv av tí tøkni, sum verður at síggja í Audi bilunum um fá ár.

Bilurin er sera framkomin í allar mátar, er faktiskt sum ein framtíðar bilur. Serliga nógv er gjørt burtur úr trygd, komforti og økonomi.

Motorurin er ein 3,2 litur 6 syl. FSI-motorur við 300 hk. Bilurin er 4.70 cm langur, 1,85 cm breiður og 1,55 cm høgur, t.v.s. at hann er millum Audi A4 og A6 í stødd.

Við Roadjet sýna Audi fyrstu ferð nýggja 7-trins direct-shift girkassan saman við einum motori sum stendur upp á longs og (4x4) quattro. Hesin girkassi líkist DSC-girkassanum, sum fæst til Audi TT og A3. Girkassin sameinir fyrimunirnar við einum manuellum girkassa við kvalitetirnar í einum nútímans automatgirkassa.

Bilurin er ein stórur hatcback við 5-hurðum og rúmligur sum ein limousine. Designið er sera einfalt við tí stóra eyðkenda Audi-kølaragittarinum. Innan líkist Roadjet ikki akkurát tí, vit kenna frá Audi í dag, designið er heilt annarleiðis. Hesin stílurin verður helst nakað, vit koma at síggja meira til í framtíðini.

”Audi Drive Select”, við hesum systeminum ber til við einum knøtti at velja millum tríggjar ymiskar innstillingar av bilinum: Comfort, Dynamic og Sport.



*Roadjet innan. Ikki akkurát tað vit kenna frá Audi í dag. Hesin stílurin verður helst nakað, vit koma at síggja meira til í framtíðini*




**ELLISAKFAR TIL SØLU**
Volvo 144. 4 hurðar (grønur). Bilurin er skrásettur fyrstu ferð í 1971. Hevur bert havt tveir eigarar. Áhugaði eru vælkomin at venda sær til.
**Tel. 213727**

- **Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum**
- **Vit umvæla øll bilmerki**
- **Klárgering til sýn**
- **Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.**



**Ring og fá eitt tilboð**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
**Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778**
**Teldupostur: plv@plv.fo**